# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Allir partar eru samdir um, at vit mugu broyta Irak-politikkin*
*(Josh Bolton, forsetaráðgevi.)*

**STUTT SAGT**

### Danir leggja minst í Norðurlond

Flestu norðmenn halda tað vera líka týdningarmikið hjá Noregi at hava góð viðurskifti við Russland sum við USA, men teir flestu meta tað kortini týdningarmest at hava góð viðurskifti við ES. Tað sæst í einari kanning, sum Norðurlandaráðið hevur latið gera. Tað serliga við úrslitinum er kanska, at norðmenn leggja størri dent á ES, enn ES-borgararnir í Svøríki og Finnlandi. Tað eru bara danir, sum leggja størri dent á ES, enn norðmenn gera. Tað mest áhugaverda við kanningini er helst, at í øllum londunum uttan í Danmark verður tættari norðurlendskt samarbeiði mett sum tað týdningarmesta av øllum.

### Hekk í bili

Fríggjadagin skal tann 21 ára gamli Afahan Mohammed Hussein fyri rættin í Birmingham í Onglandi, har hann er ákærdur fyri óviljað manndráp og fyri at vera rýmdur frá einum vanlukkustaði. Ákæran hevur samband við ein tilburð í august í 2004. Á ein ella annan hátt kom ein tvey ára gamal smádrongur at hanga fastur í bilinum hjá Afahan Mohammed Hussein, men ístaðin fyri at steðga koyrdi hann einar 300 metrar við dronginum hangandi aftan fyri bilin. Tá loysnaði drongurin, men Afahan steðgaði ikki. Tann lítli drongurin bleiv fluttur á sjúkrahús, men doyði stutt eftir.

### Grønland ornar

Veksandi hitin á Jørðini er av álvara farin at gera vart við seg í Grønlandi. Ísurin minkar skjótari enn fyrr, men tað er ikki bara óheppið. Bóndin Ferdinand Egede sigur við týska blaðið Der Spiegel, at tann veksandi hitin kemur grønlendska landbúnaðinum væl við. Í dag kann bóndin seta nógv fleiri eplir niður enn fyrr, tí altsamt størri lendi kann brúkast sum landbúnaðarjørð. Myndugleikarnir í Nuuk duga eisini at síggja fyrimunir við broytingunum, og teir ætla tí at leggja munandi størri dent á neytahald. Í tí sambandi eru ætlanir um at byggja eitt stórt mjólkarvirki, skrivar Der Spiegel.

# Iran og Sýrialand skulu útvega frið í Irak

**Aftan á eitt sera blóðugt vikuskifti í Irak vilja USA og Bretland hava Iran og Sýrialand at virka fyri friði í grannalandinum.**



*Ein irakskur løgreglumaður kannar nøkur av teimum nógvu líkunum, sum vórðu funnin í gjár*

Dagurin í gjár var sera blóðigur í Irak.

Fyrst brast ein bilbumba á einum av høvuðsvegunum í miðbýnum í Bagdad. Fýra fólk lógu eftirá, og 10 vórðu særd.

Nakrar tímar seinni sprongdi ein sjálvmorðsbumbumaður seg sjálvan og 51 fólk í luftina uttan fyri eina løgreglustøð í Bagdad. Tey flestu vóru ungir menn, sum skuldu fara undir at útbúgva seg til løgreglumenn.

Løtu seinni komu trygdardeildir fram á líkini av 25 monnum aftan fyri eitt orkuverk í býnum Baqouda 60 kilometrar norðan fyri Bagdad.

Seinastu deyðsboðini komu í gjárkvøldið, tá bretska verjumálaráðið boðaði frá, at fýra bretskir hermenn vóru deyðir í einum álopi í Shat al-Arab-veitini við býin Basra har suðuri í landinum. Fýra aðrir hermenn vóru illa særdir.

Í Bagdad kunngjørdi Nuri al-Maliki, forsætisráðharri, at hann fer at umskipa stjórnina, tí støðan ger tað neyðugt at rudda upp, segði hann. Men tað kann vera vandamikið, tí týðandi partar av stjórnarsamgonguni hava sagt, at teir fara at seta seg upp ímóti einari slíkari broyting.

### Biðja um hjálp

Í USA vunnu demokratarnir kongressvalið, tí teir kravdu eina aðra amerikanska kós í Irak, og ein av fremstu ráðgevunum hjá George W. Bush, forseta segði í gjárkvøldið, at forsetin umhugsar at biðja Iran og Sýrialand virka fyri friði í Irak.

– Forsetin fer at kanna møguleikarnar saman við sínum serligu Irak-ráðgevum, segði Josh Bolton við sjónvarpið ABC. Hann legði afturat, at allir partar eru greiðir yvir, at tað er neyðugt at endurskoða Irak-politikkin. Hann fekk alt fyri eitt undirtøku frá demokratunum:

– Tað fyrsta, sum vit mugu gera, er at finna eina aðra kós í Irak, segði senatorurin Carl Levin, sum væntandi verður nýggjur formaður í teirri senatsnevndini, sum hevur eftirlit við amerikonsku hermegini.

Í London visti BBC at siga, at Tony Blair, forsætisráðharri, er eisini hugaður fyri at biðja Iran og Sýrialand um hjálp til at fáa frið í Irak.

# Rúsevni í Fólkatinginum

**Leivdir av rúsevninum kokain eru funnar á Christiansborg**

Danska blaðið BT avdúkar í dag, at fólk hjá blaðnum hava funnið leivdir av rúsevninum kokain á tveimum wc'um í Fólkatinginum. Tey kannaðu 30 wc á Christiansborg, og á tveimum teirra funnu tey leivdir av kokaini. Talan er um tvey wc í Provinshúsinum, har fólkatingslimirnir og teirra medarbeiðarar hava skrivstovur.

Jørgen Rasmussen, varaløgregluovasti í Keypmannahavn, sigur við BT, at hann hevur onga orsøk til at ivast í kanningarúrslitinum og vísir á, at blaðið brúkti somu kanningarútgerð, sum løgreglan brúkar.

– Eg havi ongantíð hoyrt, at útgerðin hevur mistikið seg. Sigur hon, at hon hevur funnið kokain, so er kokain har, sigur Jørgen Rasmussen.

Formaðurin í rættarnevndini hjá Fólkatinginum Peter Skaarup úr Danska Fólkaflokkinum, er skelkaður av tíðindunum í BT, og hann fer at taka málið upp í formansskapinum, sigur hann.

Í summar avdúkaði eitt norskt blað leivdir av amfetamini í Stórtinginum í Oslo.

